Yvirlýsing frá Føroya Náttúruverndarfelag - FNU

# Steðgið Eiði 2 og 4 og fremjið

**– Samlaði orkutørvur landsins til ravmagn, hitaorku og flutningsorku kann á burðardyggan hátt skipast alleina við varandi orkukeldum. Fyri at náa hesum máli, má politiska leiðsla landsins taka seg um reiggj og fremja neyðuga lógarverkið soleiðis at einstaki borgarin og vinnulívsmaðurin sleppur til verka. Grundleggjandi treyt er at náttúruumsitingin fæst at virka - og ikki minst at demokratisku rættindi borgarans at gangnýta náttúrutilfeingið á burðardyggan hátt verða sett í hásætið, sigur Føroya Náttúruverndarfelag (FNU) í yvirlýsing, samtykt á nevndarfundi 7. januar 2005**



NÁTTÚRA

*Føroya Náttúruverndarfelag (FNU)*

EL-orkufelagið SEV ætlar framhaldandi at ognartaka alla Eysturoynna til vatnorkuútbyggingar. Vit hava sæð, hvussu burtur úr vón og viti stórur partur av norðari helvt av Eysturoy er mest sum turrlagdur niðan fyri 150 metra hædd. Allar áir eru horvnar og hópur av betongkassum eru bygdir í haganum til inntøk til leiðing av vatni til tað so fyrr vakra Eiðisvatn.

Føroya Náttúruverndarfelag (FNU) vísti longu fyrst í 1980-árunum á hvussu skilaleys SEV og Højgaard & Schultz ætlanin er. Ein overhonds stór íløga á meir enn 600 mill. kr. varð løgd á allar kommunuskattgjaldarar landsins fyri at framleiða so lítið sum 39 mill.kW-tímar av ravmagni.

Skaðiligu árinini við byrging fyri øllum áunum, ið í túsundatals ár hava runnið í firðir og sund, fyriuttan tapið av náttúruvirðum, siðsøgu- og mentanarvirðum, ið ikki kunnu gerast upp í kilowattum ella krónum, verða náttúru á landi og sjógvi og okkum sjálvum og eftirkomarum til óbótaligan skaða.

FNU vísti á hvussu skynsom ætlan kundi fremjast við at fara upp í hæddina í góðar 300 metrar og harvið eisini fáa nógv meiri og bíligari orku - fyriuttan at náttúra og áir ikki vildu verða við skerdan lut, í tann mun sum vit í dag eru vitni til.

### Eiði 2

SEV leiðslan ætlar at halda áfram við Eiðisverkætlanini og savna alt vatn saman í sunnaru helvt av Eysturoy og føra hetta gjøgnum tunnlar í fjallinum norður í savningarbrunnin - fyrrverandi Eiðisvatn. Eiðisverkætlanin er í 4 stigum: Eiði 1 og 3, ið eru framd, og Eiði 2 og 4 ávikavist vestari og eystari partur av syðru helvt av Eysturoy millum Sundini/Tangafjørðin og Skálafjørðin.

Útbyggingin kemur at kosta um 250 mill. kr. við teim óvissum, ið standast av truplu jarðfrøðiligu viðurskiftunum í basaltfláunum og Eysturoyarsyllini. Harafturat metir SEV sjálvt at Eiðisverkið má útbyggjast fyri aðrar 20 mill.kr. Við ætlanini at bora 4 km suður um Sandá til Breiðá beint norðan fyri Morskranes og leiða alt vatn úr øllum áunum norður til Eiðis, verður orkuúrtøkan bert 1/3 av tí hon kundi verið, um lurtað varð eftir teim ráðum FNU, Orkuráðið, felagið Berdal og aðrir ser-frøðingar mæltu til, nevniliga at fara upp í 300 metra hædd, har vatnnøgdin og eisini orkuúrtøkan er størst. Víst varð á sera skilagóðu Vambarætlanina, ið fyriuttan at geva meiri enn tvífalt ta orku Eiði 1 og 3 geva í dag, eisini vildi spart okkum náttúruvirðini við Eiðisvatn.

> ” *Sambært SEV vil framleiðslan við Eiði 2 geva uml. 20 mill. kW tímar ella tað sama sum 7 av vind-myllunum í Vestmanna, til ein kostnað á 35 mill.kr. Framleiðslukostnaðurin fyri hvønn kilowattíma verður við Eiði 2 hin sami sum fyri Eiði 1 og 3 - einar 17 til 20 kr.*

Sambært SEV vil framleiðslan við Eiði 2 geva uml. 20 mill. kW tímar ella tað sama sum 7 av vindmyllunum í Vestmanna, til ein kostnað á 35 mill.kr. Framleiðslukostnaðurin fyri hvønn kilowattíma verður við Eiði 2 hin sami sum fyri Eiði 1 og 3 - einar 17 til 20 kr.

SEV steðgar ikki á við Eiði 2, men vil halda á fram við Eiði 4 á eystursíðu av fjallarygginum og somuleiðis føra alt vatn norður til Eiðis. Við hesum missur Skálafjørðurin mesta partin av feska vatninum, og kann tað hava við sær at fjørðurin lívfrøðiliga doyr, tí frammanundan hevur hann sera lága vatnútskifting.

### Orkutørvur og tøknilig menning

Ravmagnstørvurin hevur verið rættuliga javnur seinastu 10 - 15 árini. Einans vinnuvirksemi og fólkatal hevur ávirkað vøksturin við uml. 2% árliga, tó so at avroknað ravmagnsnýtsla er fallin við gott 1 % frá 2003 til 2004. Vatnorkuútbyggingar SEV´s verða framdar við sera stuttari avskrivingartíð, og hevur hetta kostað samfelagnum kappingarføri við grannalond okkara. Hetta er óteljandi ferðir ført fram av vinnuumboðum. Kilowattímin er ein hin hægsti í Europa, og tað enntá uttan annað avgjald enn meirvirðisgjaldið.

Okkara tøki ravmagnsmáttur er tvífalt tørvin á orku, og kann tí setast spurnartekin við , hví vit framhaldandi skulu trároyna allar oyggjar fyri hvønn dropa av vatni og enntá seta nýggjar dieselmotorar upp, tá onnur skilagóð og nógv bíligari tøkni finnist.

### Kyoto, orkusparing ella útbygging

Álvarsama dálkingarstøðan við útlátum av vakstrarhúsgassum frá serstakliga avbrenning av olju, kann koma landinum aftur um brekku, um einki verður gjørt fyri at avmarka nýtsluni av olju. Nakað kann gerast her og nú við m.a. minking í oljunýtslu til ravmagnsframleiðslu, líkasum fólk og feløg við íløguáhuga mugu og skulu hava atgongd til at kunna framleiða orku. Skip, bátar og flutningur á landi fara at síggja aðrar møguleikar í vetnisorkuni, og vinna, bústaðir og bygningar annars fara at gera gagn av teim við hondina verandi orkukeldum, ið m.a. eru vindorka, aldu- og streymorka, sólorka og hitapumpur og við eini annars fallandi orkunýtsla við betri gangnýtslu og minni orkukrevjandi tólum. Við tíðina verða vit

> ” *Ravmagnsnýtslan til eini sethús er um 4.500 kilowattímar pr. ár. Av hesum eru 20 til 25% ella um-leið 1.100 kW tímar til ljósperur og ljósrør. Um allar gløðiperur í húsum og bygningum verða skiftar út við ljósdioduperur, ið einans nýta millum 0,5 og 1 watt og annars geva somu ljósstyrki sum ein 50 ella 60 watt pera, vil hetta spara okkum uml. 20 mill. kW tímar, ið svarar til 12,5% av oljuframleidda ravmagninum.*

leys av allari innfluttari orku og fáa skipað samfelagið á burðardyggum støði.

Ravmagnsnýtslan til eini sethús er um 4.500 kilowattímar pr. ár. Av hesum eru 20 til 25% ella um-leið 1.100 kW tímar til ljósperur og ljósrør. Um allar gløðiperur í húsum og bygningum verða skiftar út við ljósdioduperur, ið einans nýta millum 0,5 og 1 watt og annars geva somu ljósstyrki sum ein 50 ella 60 watt pera, vil hetta spara okkum uml. 20 mill. kW tímar, ið svarar til 12,5% av oljuframleidda ravmagninum.

Verða allir komfýrar í húsarhaldum induktónskomfýrar og gingið verður út frá, at helvtin av øllum húsarhaldum enn hava vanligu stálpláturnar, kann ein ravmagnssparing her fara frá uml. 1000 kW tímum pr.ár niður á uml. 200 kW tímar fyri hvørt húski. Við 7000 húsarhaldum er samlaða sparingin 5,6 mill. kW tímar ella 3,5% av oljuframleidda ravmagninum.

Annað sparidømi er sparing í ravmagnsmotorum. Hesir verða brúktir innan fiskiídnað, í ventilatiónsútgerð, kompressarum og pumpum o.ø. Norðurlendsk hagtøl siga at 70% av samlaðu ravmagnnýtsluni innan ídnaðin fara til motorar. Við útskifting av gomlum motorum til nýggjar sparimotorar kann fáast ein sparing uppá góð 14%. Ídnaður á landi brúkar uml. 80 mill kW tímar um árið. Við eini sparing á 14% av hesi nýtslu fást uml. 8,5 mill. kW timar spard ravmagnsorka svarandi til 5,3% av oljunýtsluni hjá SEV.

Bert hesi 3 sparidømi vísa at vit kunnu spara 34 mill. kW tímar oljuframleitt ravmagn um árið. Hetta er fyri árið 2003 góð 21,2 % ella 7.672 tons av samlaðu oljunýtslu SEV´s og 3,4% av samlaðu oljunýtslu landsins.

Verður samanbering gjørd við teir 20 mill. kW tímar, ið Eiði 2 ætlandi skal geva, er henda sparing næstan tvær ferðir so stór. Niðurstøðan er tí greið, at vit við sparingum í t.d. eitt 6 ára skeið partvís kunnu spara okkum burturúr framhaldandi oyðing av náttúru, og partvís vísa útheimin at vit eru før fyri og vilja taka okkara ábyrgd av at minka um skaðiliga vakstrarhúsárinið.

Landsstýrið eigur annars í stundini at fáa gjørt eina landsbyggireglugerð, ið ásetur orkukrøv til hús og bygningar. Einki vil tá verða til hindurs fyri at vit kunnu lúka Kyoto kravið um minking av $CO_2$ útlátinum við 8% fram til 2012.

### Burðardygg menning

Fleiri tulkingar hava verið frammi um hugtakið burðardygg menning, og er allarhelst neyðugt staðiliga at upplýsa hvør verunligi týdningurin er í hesum báðum orðum.

Upprunin til hugtakið er frá 1987 tá Brundtland - kommisiónin legði fram frágreiðingina "Vor Fælles Fremtid". 5 ár seinri varð